## Keyptu teldur fyri milliardir

Ein týsk teldufyritøka var meiri enn fegin, tá hon fekk eina bílegging frá einum týskum handilsskúla. Ein lærari hevði eftir øllum at døma bílagt telduútgerð fyri 27 milliardir krónur. Bíleggingin var sutt og greitt 99.999 lutir av øllum frá motherboards um telduskíggjar til smálutir fyri sjey krónur. Samlaði kostnaðurin var 3.673.944.860,18 euro. Tað vísti seg at vera tveir næmingar, sum høvdu bílagt alt upp á nakkan av einum lærara. Sum revsing skulu teir báðir nú í tvær vikur mála, rudda og vaska á skúlanum. Og bíleggingin? Hon varð annullerað!



## Ferðslutrygd á Kaldbaksvegnum

25. mai í ár helt Landsverk tíðindafund um eitt komandi størri og í Føroyum heilt spildurnýtt ferðslutrygdartiltak, sum stovnurin skuldi undir at gera á Kaldbaksvegnum. Hesin vegurin er tann landsvegateinurin, sum hevur mesta ferðslu, og her henda nógv ferðsluóhapp, tíverri eisini fleiri sera álvarslig óhapp. Arbeiðið er byrjað, og ymsar broytingar eru at síggja á vegastrekkinum longu nú. Talan er um eina roynd, har fleiri ymisk ferðslutrygdartiltøk verða gjørd samstundis á einum vegastrekki, upplýsir Landsvderk á heimasíðu síni.

# Vraklutir í Stord leypa ótta á fólk

**Leivdirnar av flogfarinum hjá Atlantsflog eftir vanlukka í Stord liggja framvegis við flogvøllin. Hetta síggja ferðandi sum eitt tað síðsta áðrenn tey seta seg í eitt flogfar har, ella sum eitt tað fyrsta, tá tey trína út eftir at flogfari hevur sett seg**

FLOGVANLUKKA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*


Vrakdeler fra dødsfly skremmer passasjerer

SETT FRA FLYET: Dette synet m... ser vraket godt, både før de går inn i terminalbygget og mens...
Foto: OLIVER ORSKAUG

*Hetta er útsýni gjøgnum vindeyga, tá flogfør seta seg í Stord um dagarnar. Norska Dagbladet skrivaði í gjár, at sjónligu vraklutirnir eftir vanlukkuna á Stord í fjør, loypa ótta á ferðafólk. Hesir áttu at verið fjaldir undir einum tjaldi halda bæði leiðsla í flogvøllinum og flogfelag*

*Mynd: dagbladet.no*

10. oktober fór eitt flogfar hjá Atlantsflog út av breytini á flogvøllinum Stord í Hordaland í Noreg. Vanlukkan kravdi fýra mannalív, meðan 12 fólk sluppu livandi burtur úr flogfarinum.

Nú meiri enn átta mánaðir seinni liggja vraklutir framvegis við flogvøllin, og hetta er til stóran ampa fyri ferðafólkini. Orsøkin til hetta er, at tryggingarfelagið sýtir fyri at vraklutirnir verða fluttir fyrr enn Havarínevndin kemur við sínari frágreiðing. Henda frágreiðing fyriliggur tó neyvan fyrr enn um eitt ár ella so.

Men so hvørt sum kanningarnar eru lidnar, verða vraklutirnir fluttir frá sjálvum vanlukkustaðnum. Fyri kortum varð velið loyst, men pláss er ikki fyri hesum inni í hangarinum. Tískil liggur tað uttandura, bert 150 metrar frá sjálvari breytini.

– At vraklutirnir eru sjónligir, hevur sjálvsagt negativa ávirkan á tey ferðandi. Tað er sjálvandi lítið hugaligt hjá teimum at síggja hetta, sigur varaflogvallarovastin John Førdal við norska Dagbladet.

### Fjala við tjaldi

Leiðslan á flogvøllinum hevur givið kravboð um, at vraklutirnir annaðhvørt verða fluttir ella fjaldir. Og bretska tryggingarfelagið fekk 15. juni sum freist til at finna eina hóskiliga loysn, men enn er so einki hent.

– Hetta er eitt ófrávíkiligt krav frá okkara síðu. Við kunnu ikki góðtaka, at velið liggur sjónligt fyri øllum á henda hátt, sigur John Førdal sambært Dagbladet.



*Fyri kortum varð velið flutt frá sjálvum vanlukkustaðnum, men av tí at hetta ikki passar inn í hangarin, liggur tað nú tætt við sjálva flogbreytini til ampa fyri ferðafólk*

*Mynd: polfoto*

Hann sigur seg tó skilja tryggingarfelagið, sum ikki ynskir at flyta lutirnar áðrenn kanningarnar eru lidnar, men vísir tó á, at vraklutirnir eiga at kunna fjalast við onkrum slag av tjaldi.

### Vraklutir orsøk til afturgongd

Dagbladet skrivar í greinini “Vrakdeler fra dødsfly skremmer passasjerer”, at virksemi á flogvøllinum er nógv minkað síðani vanlukkuna í fjør. Aker Kværner gavst sum kunnugt at flúgva á Stord, og flýgur nú heldur til Haugesund við sínum starvsfólkum. Coast Air, sum flýgur rutuflúgving á Stord, sigur sambært Dagbladet, at tey eisini hava merkt væl, at virksemið á flogvøllinum hevur verið fallandi.

– Vit merktu týðuligt eina minking í ferðsluni millum Stord og Oslo eftir vanlukkuna, men nú tykist tað sum um, at ferðslan aftur er vaksandi, sigur Kjell Fredheim, umboðsstjóri í Coast Air.

Norska avísin hevur eisini spurt Kjell Fredheim, hvat tey í Coast Air halda um, at vraklutir liggja fram við breytini á Stord.

– Eftir mínum tykki er tað ikki gott. Vit í Coast Air halda at vrakið átti at verði flutt, og tað er nærliggjandi at halda, at tað, at vrakið er sjónligt, hevur gjørt sítt til, at ferðslan er minkað, sigur Kjell Fredheim, sum er samdur við leiðsluna á flogvøllinum á Stord um, at tað hevði verið ein góð loysn at fjalt vraklutirnar við einum tjaldi.

# Hanus Kamban á donsku fíggjarlógina



MENTAN

Tíggju donsk listarfólk hava nú møguleika at koma á donsku fíggjarlógina og harvið verða lønt at statinum restina av lívinum. Teirra millum er okkara Hanus Kamban

Tað er umboðsráðið hjá Statens Kunstfond, sum hevur gjørt av at innstilla tey tíggju listarfólkini til mentamálaráðharran.

### Talan er um

*Keld Helmer-Petersen, myndlistamaður og fotografur*
*Simona Grotrian, rithøvund*
*Christian Hesselholdt, rithøvund*
*Hanus Kamban, rithøvund*
*Andres Nordentoft, tónaskald*
*Torben Hardenberg, gullsmiður*
*Annette Holdensen, vevkona*
*Malene Müllertz, keramikari*
*Hanne Vedel, vevkona*
*Erik Werner, teknara*

Lívslanga játtanin á fíggjarlógini verður latin skapandi listarfólki, sum hava eina slíka listrarliga framleiðslu aftan fyri seg, at tey hava gjørt seg galdandi sum listarfólk.

Játtanin, sum listarfólkini fáa, er treytað av inntøkuviðurskiftunum og liggur millum 15.000 og 140.000 krónur um árið.

Tær 10 játtaniar, sum umboðsnevndin fyri Statens Kunstfond nú hevur innstilla, eru vorðnar tøkar eftir at fólki, sum fyrr hava fingið hetta játtað, eru deyð í 2006 og 2007.